## Eitt gott ár fyri IBM servarar

TÍÐINDASKRIV
*Sp/F Kervi*

Árið í fjør gjørdist hart fyri telduframleiðarar. Á amerikanska marknaðinum lækkaði samlaða sølan við einum fimtingi til 4,3 milliardir dollarar, og tað rakti serliga teir sum framleiða servarar. Á amerikanska marknaðinum varð tað bert IBM sum økti søluna av servarum. Hetta kemur fram í eini kanning sum Gartner Group hevur gjørt.

Kappingin um marknaðarlut gerst støðugt harðari - og í løtuni vinnur IBM sær størri marknaðarlut enn aðrir. Greiningarfelagið Gartner Group hevur kannað søluna av servarum í USA og vísur á, at IBM hevur økt sín marknaðarpart frá 21,5 procent í 2000 til 29,3 procent í 2001, fyri Unix- og Intelgrundaðir servarar undir einum. Hjá Sun lækkaði parturin av tí samlaðu servarasøluni frá 22 til 21,4 procent, meðan Compaq hevði eina lækking frá 16,5 til 14,5 procent á amerikanska marknaðinum.

Av partinum av seldum Unix-grundaðum servarum økti IBM sín marknaðarpart við 3,1 procentum til 20,9 procent, meðan parturin av Intel-servara marknaðinum er hækkaður frá 1,6 procent til 12,4 procent. Á

Unix-marknaðinum helt Sun fast um sína førarastøðu við 46,4 procentum av samlaðu søluni. Aftaná Sun kom IBM og síðani HP við 16,6 prosentum og Compaq við 5,1 prosentum av marknaðinum.

IBM servarir verða í Føroyum umboðaðir av Kervi spf.

# Skiparin noktar seg sekan

**Skiparin á hetlendska trolaranum Maranatha noktar fyri, at hann hevur fiskað í stongdum øki. Veiðuna hevur hann fingið í ES-sjógvi**



FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*

Síðan mánadagin hevur trolarin Maranatha ligið við bryggju í Havn. Hann varð mánamorgunin tikin av Brimli vestanfyri Mykines. Trolarin fór úr Peterhead leygardagin.

Skiparin er skuldsettur fyri ikki at hava boðað frá, at hann var komin í føroyskt sjóøki og fyri at hava fiskað á eini stongdari leið.

Skiparin noktar seg sekan í hesum skuldsetingum. Hann sigur, at veiðan, ið trolarin hevur umborð, er fiskað, áðrenn skipið kom í føroyskan sjógv. Í sambandi við at hann ikki hevur boðað Fiskiveiðueftirlitinum frá, tá hann kom innum markið, sigur skiparin, at hann royndi at senda eitt telex, sum tó ikki er komið fram.

Fiskifrøðingar vóru í lastini mánadagin, tá trolarin kom á Havnina, og teir siga, at fiskurin var nýfiskaður.

Fútin skal nú taka støðu til, um ákæra skal reisast móti skiparanum.

# NAMMCO 10 ár á baki

**Norðuratlantiski havsúgdjóra felagsskapurin, NAMMCO, hevur havt sín 11. aðalfund. Kaj P. Mortensen úr Føroyum varð afturvaldur til næstformann**

AÐALFUNDUR
*Jóanes N. Dalsgaard*

Í døgunum 5 - 7 februar var árligi aðalfundurin hjá NAMMCO hildin í Ilulisat í Grønlandi. Á fundinum vóru, umframt umboð úr limalondunum Føroyum, Grønlandi, Íslandi og Noregi, eisini eygleiðarar úr Kanada, Danmark, Japan og Russlandi.Grønlendski landsstýrismaðurin Hans Enoksen, sum setti fundin, tosaði um týdningin av burðardyggari gagnnýtlsu av súgdjórum í havinum við Grønland. Hann tosaði eisini um, hvønn týdning NAMMCO hevur og segði, at felagsskapurin eftir 10 væleydnað ár, nú er búgvin at taka á seg enn størri ábyrgd og avbjóðingar. Hans Enoksen segði, at hesi 10 árini hevur NAMMCO megnað at fingið altjóða viðurkenning, og at stovnurin hevur skapt sær eitt trygt vísundaligt grundstøði at standa á.Ovarlaga á dagsskránni hjá NAMMCO stendur arbeiðiq at lýsa samanspælið ímillum livilíkindi hjá súgdjórum í havinum og fiskivinnuna. NAMMCO samskipaði í fjør stóru hvalateljingina NASS 2001, sum fevndi um stóran part av Mið- og Útnyrðingsatlantshavi. Tað var í sambandi við hesa kanning, at enskir myndugleikar noktaðu føroyskum og norskum kanningarskipum at koma í enskan sjógv. Aðalfundurin harmaðist um ensku avgerðina og helt at hon var eitt afturstig fyri royndirnar at varðveita og gagnnýta tilfeingi í økinum. Á aðalfundinum kom fram, at ætlanin er at halda eina ráðstevnu í íslandi í januar komandi ár, har evni verður, hvussu til ber at samansjóða praktiska og vísundaliga vitan í sambandi við gangnnýtslu av havinum.Á fundinum varð Amalie Jessen úr Grønlandi afturvald til formann og Kaj P. Mortensen úr Føroyum varð afturvaldur til næstformann.Næsti aðalfundur í NAMMCO verður í Tromsø í Noregi í marts 2003.

# Norðurlendska Bókmentavirðislønin til Noreg

Norðmaðurin, Lars Saabye Christensen fær Norðurlendsku Bókmentavirðislønina 2002 fyri ritverikið "Halvbroren." Lars Saabye Christensen er føddur í 1953. Hann kom, fyri fyrstu fer, rættuliga fram í sambandi við skaldsøguna "Beatles" í 1984. Fyrsta ritverk hansara, yrkingasavnið "Historien om Gly" kom út í 1976. Rithøvundurin, Lars Saabye Christensen, hevur gjørt vart við seg innan nógvar ymiskar bókmentagreinir, og verður hann mettur at vera ein tann besti rithøvundurin í sínum ættarliði.

Í grundgevingini fyri at lata Lars Saabye Christensen Norðurlendsku Bókmentavirðislønina stendur, at skaldsøgan "Halvbroren" ríkt og margfalt lýsir søguna hjá fleiri ættarliðum. Rithøvundurin lýsir til tíðir tað realistiska og til tíðir tað fantastiska, og er frásøgnin merkt bæði av harðrendum humori og hjartanítandi sorgarleikum. Skaldsøgan snýr seg um Barnum Nilson og hálvbróður hansara Fred. Sambandi teirra millum verður sæð gjøgnum eygu Barnums. Alt í lívinum hjá Barnum og familju hansara snýr seg um Fred, ið hevur eitt kriplað sinn, ið er merkt av vónloysi. "Halvbroren" er skaldsøga um fráveru, men eisini um vinarlag, felagsskap og kærleika. Hon gongur fyri seg í Oslo, sum rithøvundurin er ein meistari í at lýsa.



# Bústevna í Runavík

**Sølustevna við øllum, sum hoyrir húsi og heimi til, verður í Runavík fyrsta vikuskifti í mai**



*Hans Petur Ellingsgaard og Niklas Heri Jákupsson greiddu á tíðindafundi í gjár frá sølustevnuni Hús og innbúgv, sum verður í Runavík í mai*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

SØLUSTEVNA
*Edvard Joensen*

Hjá teimum, sum ætla at byggja ella umvæla bústaðin, býðst serligt høvi at fáa hugskot og hjálp á sølustevnu, sum hildin verður í Runavík í døgunum tríðja til fimta mai.

Stór søluframsýning, nevnd Hús og innbúgv, verður í ítróttarhøllini í Runavík fyrsta vikuskifti í mai. Umframt ítróttarhøllina vænta fyrireikararnir eisini at fáa brúk fyri einum stórum tjaldi, sum setast skal upp uttan fyri høllina.

Hans Petur Ellingsgard úr Runavík og Niklas Heri Jákupsson úr Klaksvík standa fyri stevnuni, sum verður tann fyrsta av sínum slag í Føroyum.

Ætlanin hevur verið frammi síðan í januar, greiddu teir frá á tíðindafundi, ið hildin var á Tórshavnar Sjómansheimi í gjár. Tilmeldingarfreistin er sett il 1. mars, og higartil eru nakrar tilmeldingar komnar. Umframt er væl av fyrispurningum. Bæði úr Føroyum og uttanlands.

Hans Petur Ellingsgaard greiddi frá, at ætlnin er at hava alt, sum yvirhøvur kann hugsast at hava við húsabygging og búseting at gera, á hesi stevnuni. Tað verið seg líka frá fíggjarráðgeving til sjónvarpstólið í stovuni.

– Vit ætla okkum at bjóða fólki alt frá tí, spakin verður settur í, til tey standa undir brúsuni, sum hann tók til.

Fyrireikararnir siga, at teir avgjørt meta tørvin á slíkar stevnu at vera til staðar. Í grundini halda teir tað vera eitt sindur løgið,a t eingin slík stevna hevur verið fyrr, siga teir.

At júst Runavík er vald til stevnustað, kann hava ymsar orsøkir. Annar fyrireikarin er úr Runavík, har hann millum annað er virkin kommunalpolitikari.

Royndirnar frá stóru fiskivinnustevnuni, sum var í Runavík í fjør, tykjast eisini hava givið áræði til at royna eina messu.

Umframt at økið rundan um ítróttarhøllina tykist væl egnað til at seta tjald upp, sum fyrireikararnir vænta neyðugt.

Sjálv ítróttarhøllin hevur umleið 500 fermetrar, sum leigast kunnu til framsýningina, greiðir Hans Petur Ellingagaard frá. Tað meta teir ikki vera meira enn umleið helvtina av tí, teir fáa brúk fyri til framsýningina. Væntandi fara framsýnararnir at hava brúk fyri væl størri básum, enn á vanligum sølustevnum.

Tann tøruvrin, sum verður aftur at ítróttarhøllini skal so loysast við at seta tjald upp uttanfyri. Tað kann so fáast eftir tørvi heilt upp til 1.000 fermetrar eyka.

Ymisk tiltøk verða í samband við stevnuna, greiða fyrireikararnir frá. Eitt nú verður skipað fyri barnaparkering, so foreldur í frið og náum kunnu gera síni ørindi á stevnuni, eins og helst eisini verður skipað fyri øðrum tiltøkum fyri børnini, vænta teir.

Umframt verður cafeteria á stevnuni. Tí fer ítróttarfelagið NSÍ at taka sær av, sigur Hans Petur Ellingsgaard.

# Uppstilling í Norðurstreymoy

**Uppstillingarfundirnir eru nógvir um dagarnar. Í Norðurstreymoy hava bæði Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin havt fyrsta uppstillingarfund**



*Gunnvá Mortensen er eitt av valevnunum á fyribilslistanum hjá Javnaðarflokkinum í Norðurstreymoy*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

UPPSTILLING
*Edvard Joensen*

Javnaðarflokkurin í Norðurstreymoy hevði fyrsta uppstillingarfund til løgtingsvalið um vikuskiftið. Fólkaflokkurin hevði sín fyrsta fund týskvøldið.

Tosið undan javnaðarfundinum hevur verið, um Helena Dam á Neystabø fór at stilla upp í Norðurstreymoy. Sjálv hevur hon avsannað hesi tíðindi, og tað er heldur einki, sum bendir á, at felagið í Norðurstreymoy er sinnað til at seta onnur enn lokal fólk á listan.

Á fyrsta upptillingarfundinum varð ein fyribils listi gjørdur, og mangt er, sum bendir á, at hann fer at standa óbroyttur eisini aftan á triðja uppstillingarfund, sum eftir ætlan fer at verða hildin sama dag, sum annar uppstillingarfundur verður, tann 24. februar.

Á fyribilslistanum eru fýra nøvn. Tvey mannfólk, og tvey konufólk. Kvinnurnar eru Soffi Egholm í Leynum, sum fyrr hevur búð í Danmark, har hon hevur verið virkin í politikki og onkuntíð enntá verið tiltakslimur til fólkatingssess. Hin kvinnan er Gunnvá Mortensen úr Hósvík, sum var uppstillað til fólkatingsvalið seinast.

Menninir báðir eru eisini gamlir kenningar á javnaðarlistanum. Hans Jacob Simonsen á Signabø var uppstillaður til kommunuvalið í Havn seinast, meðan Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, sum vera man eisini er á listanum.

Eisini Fólkaflokkurin hevur havt fyrsta uppstillingarfund í Norðurstreymoy.

Frá tí fundinum frættir Sosialurin, at eingin avgerð av nøkrum slagi er tikin, og einki navn er sett á nkran lista.

Nevnt verður, at til seinasta løgtingsval varð eingin listi gjørdur fyrr enn á triðja uppstillingarufndi, og soleiðis verður væntandi eisini hesaferð, sigur kelda okkara.

Spenningur er um, hvørt Jákup Suni Joensen, løgtingsmaður, fer at stilla uppaftur. Sosialurin hevur spurt hann, um so verður ella ikki, men hann sigur, at tað hevur hann ikki avgjørt enn.